# Vil verja tað góða samfelagið

**Javnaðarflokkurin legði mánadagin fyri í valstríðnum. Flokkurin hevur gjørt eina valskrá í 12 høvuðspunktum – har boðskaðurin er at verja »tað góða samfelagið«**

LØGTINGSVAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*




*Javnaðarflokkurin legði fram valskránna fyri fjølmiðlunum mánadagin: Hans Pauli Strøm, skrivari, Bergur P. Dam, næstformaður, Jóannes Eidesgaard, formaður, Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur í Klaksvík og Andreas Petersen, løgtingsmaður í Eysturoy*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Javnaðarflokkurin vil fegin í samgongu aftur, eftir at flokkurin í sjey ár hevur sitið í andstøðukuldanum. Høvuðsboðskapurin hjá flokkinum er at verja tað góða samfelagið, har rúm skal verða fyri øllum, ungum sum gomlum, sjúkum sum røskum.

Valskráin í 12 punktum varð løgd fyri føroysku fjølmiðlarnar á fundi í hølum Starvsmannafelagsins mánadagin.

## Familjan

Fyrsta punktið snýr seg um familjuna. Flokkurin vil tryggja verandi barsilsskipan, gera hana smidligari og laga hana til tørvin hjá einstøku familjuni. Hetta vil flokkurin gera í neyvum samstarvi við partarnar á arbeiðsmarknaðinum – eisini fyri at tryggja fíggjarliga grundarlagið undir skipanini.

Síðani vil flokkurin innføra ein systkinaavsláttur, sum er avsláttur, ið barnafamilju fáa, um tey hava fleiri børn á dagstovni ella í ansing, og uppihaldspeningurin – sum so mikið rok hevur verið um, skal varðveitast, staðfestir flokkurin.

Undir familjumálum nemur flokkurin eisini við íbúðarmarknaðin. Flokkurin heldur, at lóggávan skal broytast soleiðis, at íbúðarfeløg fáa somu rentustuðuls- og mvg sømdir, sum tey, ið byggja privat sethús. Flokkurin vil gera eina miðvísa ætlan fyri at byggja íbúðir til tey við serligum tørvi, eins og fyri lestraríbúðir.

Leigarar, sum í dag nærum eru rættarleysir, skulu hava tryggjað rættindi, heldur flokkurin.

## Heilsan

– Bíðilistar til sjúkuviðgerðir á sjúkrahúsunum skulu burtur, og flokkurin vil samskipa tey trý sjúkrahúsini betur, soleiðis at mest nytta fæst burturúr. Viðvíkjandi serviðgerð uttanlands, so heldur flokkurin, at álit aftur skal skapast á hesa skipan, so tað ikki verður ein afturvendandi trupulleiki á hvørjum ári, at fólk skulu gerast ótrygg, tí ráð ikki eru at senda tey til serviðgerðir uttanlands.

Flokkurin vil eisini fara undir eina samskipan av øllum heilsustovnum og áhugabólkum í eitt felags átak fyri fólkaheilsuna. Tilboð um heilsukanning eigur at verða givið øllum 45 ára gomlum, og kommunulæknaskipanin skal fáast at virka sum verulig familjulæknaskipan. Flokkurin heldur, at hetta eigur at gerast við eini sjúkratryggingin, men at hetta í fyrstu atløgu skal gerast við at leggja ymsu sjúkrakassarnar saman í ein landsumfatandi sjúkrakassa.

## Børn og ungdómurin

Á fólkaskúlaøkinum heldur flokkurin, at viðurskiftini hjá lærarunum eisini eiga at verða bøtt. Skipanin við ársverkum skal í hesum sambandi endurskoðast, eins og undirvísingartilfarið skal dagførast.

Fyri at javnseta lesandi ungdómin heldur flokkurin, at lærubøkurnar í miðnámsskúlunum eisini eiga at verða ókeypis eins og í fólkaskúlanum.

Frítíðartiboðini innan tónleik, musikkskúlar, ítrótt og aðra mentan skulu mennast.

## Mentan- og granskingin

Flokkurin heldur, at tað er av týdningi, at vit hava dygdargott mentanartilfar til børn og ung til tess at standa ímóti útlendskum árini. Eisini vil flokkurin tryggja mentanararvin v.ið góðum umstøðum fyri søvnini. Innan gransking heldur flokkurin, at umframt vanliga vísindaliga gransking, so eigur gransking, ið mennir okkara vinnumøguleikar, eisini at raðfestast frammalaga.

Eisini vil flokkurin stuðla tónleikaframleiðslu.

## Umhvørvi

Javnaðarflokkurin staðfestir, at umhvørvisøkið hevur ligið í órøkt í nógv ár. Her vil flokkurin virka fyri at endurnýta og skilja ruskið og forða fyri, at burturkastið frá skipum verður tveitt fyri borð. Flokkurin vil seta á stovn eina Agenda 21 skrivstovu í Føroyum og seta Kyotu sáttmálan í gildi, so Føroyar eisini taka altjóða ábyrgd.

Flokkurin vil eisini stuðla undir arbeiðið at menna alternativar orkukeldur á sjógvi og landi.

## Aldurdómurin

Eftirlønin skal tryggjast við trimum súlum, sum flokkurin málber seg. Fólkapensjónin, samhaldsfasta pensjónin og fakfelagspensiónin skal verða grundarlagið undir framtíðar pensjónsskipanini í Føroyum.

Innan eldrarøktina heldur flokkurin, at fleiri røktarheimspláss og døgnrøktarpláss skulu stovnast kring alt landið. Eisini vil flokkurin birta upp undir skipaðan eldrapolitikk – ella seniorpolitikk, sum tað eisini verður rópt.

## Fiskivinnan

Bátar undir 30 fót skulu fiska frítt, sigur flokkurin, sum eisini heldur, at Føroya skulu hava ein fiskidagamarknað, sum skal umsita og umseta fiskidagar og fiskiloyvi. Málsviðgerðin av fiskidøgum skal eisini gerast greiðari.

## Vinnan

Skattligu viðurskiftini hjá alivinnuni skulu broytast, so at tey samsvara við viðurskiftini hjá okkara kappingarneytum.

Útlendskir íleggjarar skulu hava víðkaðar møguleikar, og vil flokkurin hækka 30% hámarkið sum er fyri útlendskum kapitali í alivinnuni.

Flokkurin vil, at Føroya skulu framleiða háprísvørur við útbúnari arbeiðsmegi, og at tímalønt skulu hava útbúgvingartilboð – við fullari lønarsamsýning.

Flokkurin heldur eisini, at nýggjar vinnur og nýggir marknaðir skulu mennast. Flokkurin vil leggja eina strategi, sum skal fevna um menning av nýggjum vinnum og nýggjum marknaðum og sum heild um eina røða av stimbrandi tiltøkum eisini fyri hóttar vinnur av samfelagsligum týdningi – uttan tó at fevna um rakstrarstudning til vinnuna.

## Fíggjar- og búskaparpolitikkurin

Almennu útreiðslurnar skulu koma øllum brúkarum til góðar, við at hesi øki verða raðfest:

- o Útbúgving
- o Heilsa
- o Eldraøki
- o Umhvørvi
- o Samferðsla

Felags húsarhaldið skal fíggjast við eini samhaldsfastari skattaskipan, har breiðastu herðarnir bera tyngstu byrðarnar, sigur flokkurin, sum eisini heldur, at búskapurin skal rekast ábyrgdarfult, so vit framhaldandi kunnu varðveita og menna vælferðina.

## Miðfyrisitingin

Javnaðarflokkurin ætlar at skera burtur trý aðalráð. Flokkurin ásannar, at talið av aðalráðum er vaksið so nógv bara fyri at fáa eina politiska kabal at ganga upp soleiðis, at aðalráð eisini hava verið til smáu flokkarnar í fullveldissamgonguni.

Flokkurin heldur, at almenni bygnaðurin skal ikki vera størri enn hóskiligt er, og »hóskiligit« heldur flokkurin tað verða við seks aðalráðum, soleiðis sum ætlanin upprunaliga var við nýggju stýrisskipanini.

Javnaðarflokkurin vil leggja saman øll vinnumál, so sum fiskivinnu, oljuvinnu í eitt aðalráð, meðan skipað verður eitt nýtt innlendisráð, sum skal taka sær av almennum stovnum, kommunumálum, lógarmálum og umhvørvismálum.

## Brúkarin

Brúkaramálini hava eisini fingið sítt pláss í valskránni hjá Javnaðarflokkinum, sum heldur, at ein tíðarhóskandi brúkaralóggáva skal samtykkjast, og at skipast skal eitt brúkaraumboð til at fremja brúkarakunning og tryggja, at brúkaralóggávan verður hildin. Eisini skal setast ein brúkarakærunevnd at viðgera og taka avgerðir í kærum frábrúkarum.

## Føroyar fyri øll

Javnaðarflokkurin heldur, at tá almenn størv verða sett á stovn, so eiga hesi at verða løgd til útjaðaran. Flokkurin mælir til størri kommunalt økissamstarv, og at verðandi útbygging av samferðsluni skal halda fram, og nýggjar ætlanir skulu setast í verk.

Um sjálvstýrismálið sigur flokkurin, at við støði í uppritinum um »Tjóðskaparligu semjuna« verður arbeitt fyri, at sjálvstýrismálið fær eina gongd, sum flestu føroyingar kunnu taka undir við – helst 80-90 ella 100%, sum formaðurin málbar seg á tíðindafundinum mánadagin.






*Formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard, vil ikki útihýsa nøkrum flokki í einum møguligum samgongusamstarvi eftir løgtingsvalið. Høvuðsmálini hjá Javnaðarflokkinum undir valstríðnum verða familju-og heilsupolitikkurin.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nú skal Javnaðarflokkurin í landsstýrið

**Javnaðarflokkurin vil, eftir sjey ár í andstøðu, aftur stjórna føroyska samfelagnum. Flokkurin útihýsir ikki samgongusamstarv við nakran av hinum flokkunum og galdandi fíggjarkarmar við skerdum blokkstuðuli skulu varðveitast**

LØGTINGSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Bíðilistar burtur, bíligari mjólk, ókeypis lærubøkur, tónleikur stuðlast, systkinaavsláttur og ein betra Barsilsskipan. Seinnapartin mánadagin legði Javnaðarflokkurin, sum fyrsti flokkur, sína valskrá fyri løgtingsvalið 2004 fram.

Tilboðini frá Javnaðarflokkinum eru mong, ja so nógv, at ein kundi freistast at hildið, at jólini í ár halda fram til 20.januar. Komandi dagarnar fara hinir flokkarnir at leggja sína valskrá fram, og teir hava óivað heldur einki ímóti, at jólini verða longd ein góðan mánað í ár.

Javnaðarflokkurin hevur ikki verið í samgongu síðan 1996, og flokkurin vil gera alt fyri at koma fram at aftur eftir løgtingsvalið 20. januar. Flokkurin vil ikki útihýsa nakran flokk í einum møguligum samgongusamstarvi eftir løgtingsvalið.

Hóast Javnaðarflokkurin var harðliga ímóti, at blokkstuðulin varð skerdur, so sigur flokkurin seg kortini vilja arbeiða undir galdandi fíggjarkarmum við skerdum blokkstuðuli. Hvørki lántøka ella øktur blokkstuðul kemur upp á tal.

## Ongin ávísur

Jóannes Eidesgaard sigur, at høvuðsmálini hjá flokkinum í valstríðnum verða heilsu- og familju politikkurin. Javnaðarflokkurin ætlar eisini at markera seg á vinnu- og fiskivinnuøkinum. Valskráin boðar frá, at flokkurin framvegis heldur fast um solidariska grundarlagið, sum Javnaðarflokkarnar í Norðanlondum hava gjørt til sítt vørumerki.

Jóannes Eidesgaard vil kortini ikki útihýsa einum møguligum samgongusamstarvi við Fólkaflokkin, sum av røttum kann sigast at vera mótsvarið til solidarisku skipanirnar hjá Javnaðarflokkinum. –Vit sótu í samgongu við Fólkaflokkin í árunum 1991-93, og hóast vit hugsjónarliga mugu sigast at verða mótsetningar, so fingu vit kortini nógv av skafti. Eg kann millum annað nevna, at ALS varð hesi árini sett á stovn, sigur Jóannes Eidesgaard.

Javnaðarflokkurin hevur øll árini í andstøðu valt at vera opin fyri øllum samgongumøguleikum. Undir framløguni av valskránni kom greitt til sjóndar, at flokkurin heldur fast um somu kós. –Tað vísir seg vanliga, at tað er ov lítið, at tveir flokkar finna saman. og tí er neyðugt, at vit halda øllum møguleikum opnum. Vit hava havt eitt gott andsstøðusamstarv við Sambandsflokkin seinastu árini, og hetta samstarv kann møguliga enda við einum samgongusamstarvi, men vit mugu eisini verða opin fyri øðrum flokkum, sigur hann

## Skeivar raðfestingar

Valskráin hjá Javnaðarflokkinum er breið, og tað trýtur ikki við góðum tilboðum, um tú velur at seta krossin við lista C. Tað er kortini ein sannroynd, at alt kostar, og stóri spurningurin til Javnaðarflokkin má verða, hvussu flokkurin ætlar at fíggja tilboðini.

– Seinastu fimm árini hava føroyingar verið vitni til ein einvísa prioritering sum eitur fullveldið. Nú skal leggjast á annan bógv, og valskráin hjá okkum vísir greitt, at vit vilja prioritera øðrvísi enn undanfarna samgonga, sigur Jóannes Eidesgaard.

*Valskráin sær dýr út, hvussu skal hon fíggjast?*

Fíggingin má til ein og hvørja tíð passa teimum fíggjarkarmum, sum nú einaferð eru galdandi. Síðan vit vóru í samgongu eru fíggjarlógin økt við 1,5 milliard. Okkara valskrá fevnir um eitt fýra ára skeið, og tí haldi eg, at vit eru beskeðin. Eg havi skrivað fleiri valskráir áður, sum hava verið væl dýrari enn henda. Sum sagt, so snýr tað seg um eina rætta prioritering, sigur formaður Javnaðarfloksins

Javnaðarflokkurin nýtti stóran part av framløguni av valskránni til at greiða frá, at raðfestingin á vinnuøkinum eigur at broytast. Flokkurin metir, at føroyska vinnulívið eigur at vinna føroyska samfelagnum størri inntøkur. Í sjálvari valskránni leggur Javnaðarflokkurin upp til, at føroyska vinnulívi eigur at gerast meira fjøltátta, so føroyska samfelagið fær fleiri bein at standa á.

*Hava tit nakrar konkretar ætlanir á hesum økinum?*

Nei tað hava vit ikki í løtuni. Í føroyska samfelagnum eru nógv klók høvd, sum kundu verið frálíkir ígongdsetarar. Eg kann nevna biotøkni sum eitt øki, har føroyingar áttu at satsa meir upp á. Heldur enn at skriva Hvítabøkur, eiga vit at nýta klóku høvdini í vinnulívinum, har tey kunnu vinnu okkum størri inntøkur, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Eingin lántøka

Hóast greið tekin eru um, at búskaparvøksturin í Føroyum er steðgaður, og bæði ali- og rækjuvinna eru í svárari kreppu, so sigur Jóannes Eidesgaard , at tað kemur ikki upp á tal at fara út um landoddarnar at læna pengar. Hann slær eisini fast, at ein øking av blokkstuðulinum kemur heldur ikki upp á tal.

Sjálvsstýrissamgongan hevur seinastu árini arbeitt við at einskilja nakrar av almennu fyritøkunum, so føroyska samfelagið fekk fleiri inntøkur. Ein átrokandi spurningur til javnaðarflokkin er, um flokkurin tekur undir við møguligum einskiljingum, so fleiri inntøkur koma í landskassan, og fíggjarliga rásarúmið gerst størri.

– Vit vilja altíð verða við til at diskutera einskiljing. Tað er ógvuliga týdningarmikið, at endamálið við eini einskiljing er tað rætt. Tað má ikki bara vera hugsjónarligt ella eitt fullveldi, sum avger um almennu fyritøkurnar skulu einskiljast, men heldur skal spurningurin verða um tað tænir føroyska samfelagnum. Tosar tú um fyritøkur sum Føroya Tele og Atlantsflog, so halda vit tað verða í ordan. Økið sum heimarøkt og onnur umsorgan av borgarunum heldur Javnaðarflokkurin hoyra undir almennum regi, greiðir Jóannes Eidesgaard frá.